# Sjálvstýrandi VW Touareg

**Um bilarnir fara at koyra uttan bilførara í framtíðini, vita vit ikki enn, men á Volkswagen menningarmiðstøðini í Silicon Valley í Kalifornia, koyrir ein sjálvstýrandi VW Touareg royndarbilur**



*Her situr bilførarin í høgru síðu á einum vinstrastýrdum bili. Sum tað sæst á myndini, situr ein elektroniskt stýrdur armur á automatisku girstongina*

BILAR

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Flestu bilførarar droyma um at sita við rattið á nýggjastu og mest framkomnu bilunum, men í einum VW Touareg royndarbili á eini royndarstøð hjá Volkswagen í Kalifornia, verður bilførarin settur til síðis. Bilurin kann nevniliga koyra, uttan at bilførarin situr við rattið. Rutan, ið bilurin skal koyra, verður tastað inn, síðan finnur bilurin út av rest.

Sum útgangspunkt er talan um ein heilt vanligan Touareg, ið er útgjørdur við hópin av sensorum og einum netið av laser-detektorum, myndatólum, 24 GHz radarskipan og eini satellitstýrdari navigatiónsskipan, ið arbeiðir við størsta neyvleika.

Øll hesi framkomnu elektronisku tólini gera sítt til, at bilurin uttan førara kann finna vegin fram skjótt og ógvuliga akkurát.

Ein streymur av upplýsingum fóðrar eina high-performance teldu, sum við ógvuliga samansettari og einastandandi tøkni gevur boð til t.d. róðurgreiðirnar, spitaran og bremsuskipanina. Framkomna tøknin ansar eftir, at bilurin umgangandi reagerar upp á broytingar á koyribreytini.

Bilurin er umbygdur hjá Elektronic Research Laboratorium (ERL) í Silicon Vally í Kalifornia. ERL er ein menningarmiðstøð hjá Volkswagen-konsernini, har serligur dentur verður lagdur á at teir alla tíðina skulu vera í fremstu røð við menningini av framtíðar intelligentum bilum.

Sjálvstýrandi bilar er eitt av høvuðsprojektum ERL, og ætlanin við hesum er at brúka vísindaligu royndirnar og tøkniligu nýskapanirnar til at menna trygdina í framtíðar bilum.



*VW Touareg royndarbilurin við allari tøkniligari útgerð. Leggið til merkis at yvir bakhjólinum stendur at bilførari er ikki neyðugur*

# Kinesarar keyptu MG Rover

**Nú eru ikki nógv kend bilmerkir eftir á bretskum hondum. Rolls-Royce og Mini eru seldir til BMW, og VW-konsernin eigur Bentley. Herfyri vórðu so bilmerkini MG og Rover seld til kinesarar**

BILAR

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Síðan MG Rover fóru á húsagang, hevur stór óvissa valdað um framtíðina hjá bilverksmiðjuni. Herfyri varð so verksmiðjan keypt av kinesisku bilverksmiðjuni Nanjing Automotive.

MG Rover fóru á húsagang í april í ár við eini skuld upp á 15 milliardir krónur, hóast teir seldu 112.000 bilar í fjør. 5.000 starvsfólk vórðu koyrd til hús.

Hvørki Nanjing Automotive ella Pricewaterhouse-Coopers, sum hevur umsitið trotabúgvið, vilja siga nakað um prís. Nanjing Automotive bleiv stovnað í 1947 og er elsta bilverksmiðja í Kina.

Nanjing Automotive koma at flyta allan verksmiðjuútbúnaðin til Kina uttan framleiðsluna av nøkrum sportsbilum sum t.d. MG TF, sum framvegis skulu framleiðast í Onglandi, á eini MG Rover verksmiðju í Longbridge nærhendis Birmingham. Har fáa umleið 2.000 fólk arbeiðið aftur.



*MG TF skulu framvegis skulu framleiðast í Onglandi.*





*MG Rover bilverksmiðjan er nú seld til kinesarar*